BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

2. mai 2025
Mál: 22/22133-125
Viðgjørt: JáR

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-099/2024 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, eftir § 52a í Tingskipanini, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um at seta á stovn installatørútbúgving í Føroyum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. **Eru ætlanir um at seta installatørútbúgving á stovn í Føroyum?**
2. **Um ja, er nakað fyrireikandi arbeiði gjørt?**
3. **Hvør er metti kostnaðurin, og hvussu skjótt kundi ein slík útbúgving byrjað í Føroyum?**

Svar

Til 1: Ongar ítøkiligar ætlanir eru at seta installatørútbúgving á stovn í Føroyum. Í verandi løtu taka føroyingar útbúgvingina umvegis donsku skipanina. Tó er landsstýrismaðurin sinnaður at viðgera málið, um so er, at ein størri tørvur vísir seg at vera á hesum.

Til 2: Einki fyrireikandi arbeiði er gjørt í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum seinnu árini, men nevnast skal, at sambært upplýsingum frá Vinnuháskúlanum hevur útbúgvingin áður verið boðin út saman við maskinmeistaraútbúgvini árini 1990 til 1992. Undirtøkan minkaði tó skjótt burtur í næstan einki, og var orsøkin tá helst, at tað tá bert tók á leið 1 ár meiri at gerast maskinmeistari, og tí valdu fleiri helst henda møguleikan framum.

Til 3: Ein kostnaðarmeting skal takast við ávísum fyrivarni til tað stendur greitt júst hvat innihaldið í útbúgvingini vildi verið. Men til samanberingar kostar eitt skúlaár á miðnámi fyri ein flokk uml. 1,5 mió kr., og er kostnaðurin fyri eitt semestur á professiónsbachelorútbúgvingini sum byggifrøðingur á Hægri Námi á Glasi umleið 600.000 kr. fyri hvørt semestur. Um samanborðið verður við hetta, vildi ein útbúgving sum elinstallatør, sum tekur 2 ár, kostað umleið 2-3 mió. kr.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður